# Brúðarmyndir




Øllum tykkum, sum á ymsan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum 19. desember 2004, takka vit hjartaliga. Vit ynskja øllum eitt gott nýggjár.
*Kærar heilsanir*
**Sigrid og Absalon Jacobsen**
**Vági**



Hjartaliga takka vit tykkum, sum vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 9.10.2004 hugnaligan og minnisríkan. Takk fyri gávur, blómur, heilsanir og fjarrit.
*Vinarliga*
**Guðrun og Mortan Vang**



Hjartaliga takk til øll tykkum, ið gjørdu okkum hjúnabandsdegin hin 9.10.2004 so ríkan og ógloymandi.
**Nina og Jens Marni Hansen**

# Marran hjá Kyndli

**Menninir hjá Kyndli skulu sunnudagin vísa, at teir megna at basa hoyvíkingum, sum leingi hava verið marran hjá føroyameistarunum**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Seinnu árini hevur tað gingið ógvuliga striltið hjá Kyndli at basa hoyvíkingum. Í fjør var heilt galið, tá ið ósigrarnir hjá Kyndli móti júst H71 vóru nær við at kosta teimum grønu føroyameistaraheitið. Í steypakappingini var tað eisini H71, sum setti fót fyri Kyndli, og spurningurin er tí, um tað eydnast Kyndli í hesum kappingarárinum at fáa gjørt ein enda á H71-kompleksinum.

Tá ið liðini hittust í fyrra dystinum í grundspælinum í Hoyvík í november mánað, sá tað annars út til, at Kyndil ikki slapp av við marruna, tí tá vann H71 31-27. Men ein lítlan mánað seinni eydnaðist tað so teimum grønu í høllini á Hálsi at vinna 29-26 á hoyvíkingum.

Sunnudagin hittast hesi bæði liðini so aftur í endaspælinum á Hálsi, og skal Kyndil royna at fylgja við vestmenningum, so er neyðugt hjá teimum at basa H71.

### Grannadystur í Vestmanna

Oddaliðið VÍF skal sunnudagin spæla á heimavølli. Vestmenningar hava verið stak væl fyri seinastu umførini, og teir mugu metast sum stórfavorittar, tá ið grannarnir úr Kollafirði vitja í høllini í Vestmanna. Seinasta sunnudagin vitjaði VÍF í Havn, har teir vunnu ein tryggan sigur á Neistanum. Tá var Sámal Joensen heilt stóri spælarin hjá vestmenningum við sínum 13 málum, og sunnudagin verður Áki Olsen so aftur við á liðnum, eftir at hann var leikbannaður móti Neistanum.

Kollfirðingar dystaðust farna leygardag við Kyndil á Hálsi, og tá stóð leingi nógv á hjá havnarliðnum, áðrenn teir fingu bast KÍF. Spurningurin er eisini, hvussu úrslitið í dystinum hevði verið, um ikki kollfirðingar tíðliga í seinna hálvleiki mistu landsliðsleikaran Regin Petersen, ið fekk sína triðju útvísing.

Vestmenningar skulu tó ikki taka nakað fyri givið sunnudagin, tí tá ið liðini í grundspælinum hittust í Vestmanna, eydnaðist tað akkurát VÍF at basa KÍF. Úrslitið gjørdist 22-21 til vestmenningar. Hinvegin var eingin ivi, tá ið liðini nakað eftir hetta hittust í Hoyvíkshøllini, tí tá vunnu vestmenningar 32-20.

### Strandingar ríða á aldukambinum

Seinasti dysturin í Atlantic Airways-kappingini hetta vikuskiftið verður á Skála sunnudagin, har StÍF fær vitjan av botnliðnum Neistanum. Strandingar tykjast av álvara at verða komnir fyri seg, nú teir aftur hava fingið Marian millum stengurnar.

Tá ið StÍF fyri viku síðani vitjaði í Hoyvík, fingu hoyvíkingar av at vita, og tað var ikki sørt, at spælið hjá strandingum í tí dystinum kveikti gomul minnir frá glæsiligum tíðum hjá StÍF.

Neistin hevur hinvegin havt tað trupult alt kappingarárið, og liðið liggur einsamalt í botninum av kappingini. Hinvegin mundi avrikið hjá Neistanum móti vestmenningum farna vikuskifti verða eitt tað frægasta í longri tíð hjá havnarliðnum, og tað eigur at geva vón um frægari úrslit í næstum. Um tað fer at bragda á Skála sunnudagin, má metast ivasamt, men møguleikin er til staðar.

Tað er eisini ein styrkur fyri Neistin, at ein av sterku útlendsku spælarunum hjá felagnum, Blagoje Buha, er komin við aftur eftir skaðasteðg, og móti VÍF sunnudagin var hann toppskjútti við átta málum.

Í grundspælinum gekk tað soleiðis, at Neistin í seinasta dystinum í grundspælinum vann 31-28 inni á Skála, meðan StÍF í fyrsta dystinum í kappingarárinum vann 34-28 í Havn.

# Greiðir favorittar í øllum dystunum

**Fýra dystir í fremstu flogbóltsdeildunum eru á skránni um vikuskifti, og í øllum fýra førunum má annað liðið sigast at verða greiður favorittur**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Allir fýra dystirnir verða leiktir sunnudagin, og tveir av teimum eru á Kambsdali. Bæði oddaliðini hjá kvinnunum, Mjølnir og TB, skulu spæla á útivølli, meðan oddaliðið hjá monnunum, SÍ, hevur frí hetta vikuskiftið.

### Grannauppgerð í Havn

Lítið man verða at ivast í, at kvinnurnar hjá Mjølnir eru stórfavorittar til at vinna dystin móti ÍF sunnudagin, hóast tær taptu fyri TB farna vikuskiftið.

Menninir hjá Mjølnir vita, at um teir ætla sær at hanga í sørvingum, so er neyðugt hjá teimum at vinna á ÍF á Kambsdali sunnudagin, og tað er eisini ógvuliga sannlíkt, at so verður. Mansliðið hjá ÍF hevur ikki somu styrki sum áður, og tí eru føroyameistararnir úr Klaksvík greiðir favorittar.

Botnliðið hjá kvinnunum, SÍ, fær í Sørvági vitjan av oddaliðnum TB. Tað hevði verið einki minni enn ein sensatión, um unga manningin hjá sørvingum hevði megnað at gjørt nakað við oddaliðið, sum síðsta vikuskifti vann á føroyameistarunum úr Mjølnir í Klaksvík.

Hjá monnunum verður eisini ein dystur á skránni í Havn. Tað er dysturin millum tey bæði havnarfeløgini, Fleyr og Fram, sum verður leiktur í Gundadalshøllini sunnudagin. Hesi bæði lið hava spælt nógvar tættar og spennandi dystir gjøgnum árini, men sum kappingarárið í ár hevur lagað seg higartil, so má Fleyr metast sum favorittur til at vinna dystin móti Fram, sum hevur víst seg at verða rættuliga óstøðugt og tí torført at meta um.